# Minkið Føroya Løgting úr 33 til 17 tinglimir – og sparið 20-30 milliónir árliga

REGIN EIKHÓLM



Samanbera vit okkum við Ísland, Danmark og Noregi, so er Føroya Løgting tað mest yvirumboðaða beinleiðis fólkavalda Tingið og Landsstýrið er ikki minni yvirumboðað.

**Føroyar ein tinglim pr. 1500 íbúgvar**
Í Føroyum búgva 48.647 fólk og Løgtingið hevur 33 limir. Hetta svarar til, at 1.500 føroyingar skulu bera ella gjalda fyri hvønn tinglim. Landsstýrisfólkini eru 9 í tali, og harvið eru 5.400 føroyingar til at bera ella gjalda fyri hvønn landsstýrislim ella ráðharra.

**Ísland ein tinglim pr. 5.100 íbúgvar**
Í Íslandi búgva 319.368 fólk og Altingið hevur 63 limir og sostatt eru 5.100 íslendingar um hvønn tinglim. Ráðharrarnir eru 12 í tali, og harvið eru 26.600 íslendingar um hvønn ráðharra. Íslendingar eru sostatt gott tríggjar ferðir fleiri til at gjalda fyri hvønn tinglim og fimm ferðir fleiri til at gjalda fyri hvønn ráðharra enn føroyingar.

**Danmark ein tinglim pr. 30.900 íbúgvar**
Í Danmark búgva 5.532.531 fólk og Folketinget hevur 179 limir og sostatt eru 30.900 danskarar um hvønn tinglim. Ráðharrarnir eru 19 í tali, og harvið eru 291.200 danskarar um hvønn ráðharra. Danir eru sostatt 20 ferðir fleiri til at gjalda fyri hvønn tinglim og 54 ferðir fleiri til at gjalda fyri hvønn ráðharra enn føroyingar.

**Noregi ein tinglim pr. 28.700 íbúgvar**
Í Noregi búgva 4.856.480 fólk og Stortinget hevur 169 limir og sostatt eru 28.700 norðmenn um hvønn tinglim. Ráðharrarnir eru 20 í tali og harvið eru 242.800 norðmenn um hvønn ráðharra. Norðmenn eru sostatt 19 ferðir fleiri til at gjalda fyri hvønn tinglim og 45 ferðir fleiri til at gjalda fyri hvønn ráðharra enn føroyingar.

Sí stabbadiagram

**Niðurstøða**
Omanfyri nevndu tøl tala fyri seg og áttu at givið okkara fólkavaldu nakað at hugsað um. Havandi í huga, at løgtingsarbeiðið fyrr bert var at rokna sum framíhjá arbeiði og eisini lønt hareftir, so er løgtingsarbeiðið í dag lønt sum fulltíðararbeiði, og tí er møguleikin fyri góðari uppmøting til viðgerð av málum betri enn nakrantíð.

Við 17 fulltíðar løgtingslimum skuldi okkara demokratiska skipan kunna klárað seg eins væl og hon gjørdi við 32 parttíðar løgtingslimum. Ein sparingin upp á eina til hálvaaðru millión krónur pr. løgtingslim árliga er ikki órealistisk tvs. 20-30 milliónir krónur árliga frá sparingum í lønum, nevndararbeiði, hjálparfólki, ráðgevum, borðfæ, pensiónum, spardum høliskapaciteti og øllum handans stuðuli annars.

Minka vit eisini Landsstýrið úr 9 til 5-6 limir eru fleiri milliónir at spara har. Áhugavert kundi verið at fingið eina neyvari útgreining av omanfyristandandi, tí í verandi fíggjarstøðu stendur okkara parlamentariska yvirumboðan als ikki mát við landsins fíggjarligu formáan.

Ein áhaldandi skerjing mótvegis pensionistunum fyri at fíggja hesa til tíðir meir ella minni glantrileiks líknandi parlamentarisku yvirumboðan eigur ikki at halda fram. Her er ein gyltur møguleiki – í verki – at virða tey gomlu, ið undan hava slóðað!




## Meðan vit bíða..

FRÍÐÁLVUR JENSEN



**at fara undir endurspæl av fantastisku avrikunum eftir stórtalentið, Michael Jackson, er ikki bara, sum at siga tað**

Tí, er tað við serligum spenningi, eg nú siti við sjónvarpskíggjan hetta friggjakvøldið, tí, tá eg skrivaði greinina um hann á sinni, fekk eg eina sterka kenslu av einum fantastiskum framleggjara og skaldi, sum sanniliga hevur sett seg í mítt tónleikaliga perspektiv.

Vit eru, ongin ivi um tað, í sambandi við eitt av allar fremstu innan tónleikaliga heimin, og tað setur sannilig síni krøv.

Eg segði tað beinanvegin, tá eg hoyrdi Onnu fyrstu ferð, at tað var ongin ivi um, at eitthvørt krav til hennara fór hon at megna, og sum støðan er, kunnu vit bert staðfesta, at soleiðis er.

Sjálvur eri eg ómetaliga fegin um ta støðuna vit eru í, tí eggjanin til enn fleiri avrik liggur jú í teimum, sum veruliga geva seg í stóru kappingini – har er ANNA ein serlig fyrimynd, tí hon eisini vísir seg við einum persónligum framfýsni, sum bara ger hana enn sterkari.

Hoyrdi hana, um hennara átrúnaðarligu støðu, sum eg sanniliga ikki leggi til grund fyri hennara avrikum, mín støða er bara hennara evnaríku avrik – hon setti seg bara enn størri í mínum metum – hetta, at hon hevði sett sær eitt tónleikaligt mál – fantastiskt!

Onki er av sær sjálvum givið, tí vit noyðast at seta okum nøkur miðvís mál, sum Anna sanniliga hevur gjørt – tað virði eg hana fyri!

Gávi satt, at vit síggja nakað í okkara evnum og mentanarliga fólki, tí, tá alt annað tykist at fara fyri skeyti, er tað ofta so, at mentanin stendur eftir – HANA KANN VÆL ONGIN TAK FRÁ OKKUM.

Alt besta ANNA!

# Vatikanið á Tinghúsvegnum

INGI ANDREASEN

Fyri stuttum datt ein steinur undan loftinum í Hvalbiartunnlinun, og tað bleiv ikki hissini gjørt burtur úr hesari hending í Kringvarpinum og miðlunum annars, men hóast hetta er mestsum hvønndagskostur í tunnlunum Norður um Fjall, hoyrist einki um hetta frá okkara fjølmiðlum.

Seinastu árini havi eg koyrt nógv gjøgnum hesar tunnlar, luftin er tung og slavin, tað dryppar undan loftinum, myrkt og kalt og einaferð eg fór norður við lastbili, mundi eg ikki komið ígjøgnum, tí við lastbili var tað so óhugnaliga trongt, at eg fekk andaneyð.

Miðlarnir vóru eisini tiganadi, tá ið eitt ferðsluóhapp hendi har í fjør heyst, og kann eg bert ímynda mær, hvussu hesi fólk hava havt tað. Tí umframt óhugnan og neyðina, kundu tey ikki fáa boð frá sær.

Har er:
1) einki fartelefonsamband
2) eingin neyðtelefon
so tað er tilvildin, ið ræður, um fólk, ið eru fyri óhappi í hesum tunnlum, fáa hjalp ella ikki.
3) einki ljós er í tunnlinum
4) eingir eldsløkkjarar
5) eingin tilbúgving

Har er snøgt sagt einki.

Bjargingarroyndir eru javnan í teim stóru, vælupplýstu og vælventileraðu tunnlunum. Har er fartelefonsamband, neyðtelefonir, eldsløkkjarar og sjálvt dansitónarnir frá Elis eru at hoyra.

Sjálvandi skal okkara tilbúgving hava venjingar, men í tunnlunum norður um Fjall eru ongar venjingar. Eg skilji væl, at so er, tí helst hevði eingin komið livandi frá einari slíkari venjing.

Ikki tí, peningur trýtur ikki innan hetta øki, tað er bert at umsita hann á rættan hátt. Hundraðtals milliónir verða nýttar til at uppgradera nærum nýggjar tunnlar, og aftur í ár er stór upphædd sett av til enn fleiri uppgraderingar, meðan teir ið ditta sær at nevna eitt nýtt berghol Norður um Fjáll, verða skírdir ørvitisknokkar og tað, ið verri er. Hví hava øll so ilt av hesum tunli, og hví hoyrist einki í miðlunum um, hvussu vánaligir og vandafullir hesir tunnalr eru.

Landsverk umsitur hesar játtanir, og eiga okkara politikarar at ábyrgda leiðsluna á hesum stovni fyri eina heldur margháttliga, kanska vánaliga umsiting av skattgjaldarans peningi.

Um hesar játtanir høvdu verið umsitnar við ábyrgd, er peningur tøkur til at byrja upp á henda tunnil, ja helst í inniverandi fíggjarári.

Tað er á hvønn mans munni, at samstundis sum fólk fara undir at prýða vindeyguni við perum undan jólum, ger Landsverk tað sama á vegunum kring landið, tí tá fer tað, ið koyra kann hjá Landsverki blinkandi út á vegirnar, tí nú skal gongd á. Vegir og tunnlar verða stongdir, ferðslan verður beind upp í fjøllini í stormi og kavaroki, tí nú skal Landsverk asfaltera.

Eitt árið, aftur beint undan jólum, bleiv ferðslan beind á Oyggjarvegin, tí Landsverk skuldi gera eina seyðasmogu undir vegnum til Kaldbakstunnilin.

Landsverk er ráðgevi hjá okkara politikarum, men hvussu er henda ráðgeving. Kemur ráðgevingin frá landsverk, ella er landsverk bert eitt slag av millumhandlara ella postkassa, fyri útlendskari ráðgeving. Eg veit ikki, men tað er nakað ið bendir á at so er, tí var ikki ein svenskur serfrøðingir, ið kannaði tunnilin í Hvalba dagin fyri steinurin datt undan loftinum?

Hevur Landsverk ikki fólk, ið hava henda førleika?

Hoyrdi fyri stuttum, eg meini at tað var í Tingvarpinum, at Landsverk í desembur mánaði hevði gjørt tvær kostnaðarmetingar. Eg veit ikki, hvat metingarnar snúu seg um, men hvør av hesum metingum var upp á kr. 1.000.000.

Í januar – ein mánað aftaná – er metingin frá sama stovni ávikavíst kr. 57.000 og kr. 6.000.000. Keine hexerei nur behandigheit, ella…

Sum aðrastaðni verður hjá Landsverk spart við at koyra fólk til hús, men hjá hesum stovni er hesin spariháttur heilt burturvið. Tað er ikki maðurin við spakanum, ið kostar tær stóru upphæddirnar, men hesir eru neyðurgir til at halda okkara veganet við líka, og tað sama er galdandi fyri nógvar aðrar stovnar.

Her eiga okkara landspolitikarar eiga at taka ábyrgd og at tynna út í »Vatikaninum« við Tinghúsvegin. Frá høvdinum skal man hvalin skera, segði Sámal Mathias, og soleiðis eigur at verða gjørt. Messurin verður ikki koyrdur í land, um eitt skip ikki fiskar, tað er skiparin, og soleiðis eigur tað eisini at vera á almennum stovnum.

Okkara fólkavaldu eiga at taka ábyrgd av hesum, ikki bara á Landsverki, men á øllum almennum stovnum. Um hetta verður gjørt, verður peningur tøkur til tunnilin Norður um Fjall og annað við.

Eg ætli mær ikki út í nakað blaðkjak, men eg vóni, at hetta fær onkran av okkara fólkavaldu at vakna.